Summar SURR



Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

# Nakni sannleikin

Eri í feriu. Uttanlands. Hitastigini liggja um 25-30. Børnini renna nakin á nýsligdnu grasplenuni. Sjálv eri eg í bikini, og lati meg í ein summarkjóla, tá vitjandi koma framvið.

Hjá børnunum er tað so natúrligt at vera nakin, tey hugsa ikki um, at nakað skal dyljast.

Nær byrja vit í grundini at skammast um okkara kropp og lata okkum í - ella verða noydd at lata okkum í?

Hesin spurningur gjørdist klárur fyri mær í gjár, tá eg og familjan vitjaðu í svimjihylinum. Ein ung genta, kanska 12-13 ár, rann runt og spældi við nakrar javnaldrar. Í spælinum verður hon avbrotin av einum av starvsfólkunum, eini eldri kvinnu, ið leiður hana yvir til skiftingarrúmið. Eg hoyrdi ikki samrøðuna, men eftir eina lítla løtu kemur eldri kvinnan út við einum toppi til gentuna – hennara smáu, næstan ósjónligu bróst skulu fjalast. Gentan sær flov út og heldur um bringuna. Aftaná nógvar ymiskar toppar (vænti, at allir vóru ov smáir) fær hon ein, sum passar, og kann halda áfram við spælinum.

Mær tók so hjartaliga synd í hesi gentu. Tí tað var so sjónligt, at hon ikki var greið yvir, at hon ikki longur var eitt barn, men ein spírandi kvinna.

Í fjør var eg í Berlin. Týskarar eru kendir fyri sínar nudiststrendur og á DDR-savninum var greitt frá, hvussu siðurin við at lata seg úr øllum klæðunum var ein háttur at vísa sítt persónliga frælsi. Kommunistisku valdsharrarnir kundu ikki stýra, hvussu borgararnir sóu út, tá teir vóru á strondini.

Hóast vit høvdu hesa søguna feska í minninum, vóru bæði eg og starvsfelagin skelkaðar, tá vit komu inn á eitt øki á einum feriustaði, har bara vit báðar vóru í svimjidrakt. Fnisandi fóru vit út aftur, og hóast eg síggi meg sjálva sum rímuliga frígjørda, so skal tað nógv til, áðrenn eg fari aftur á nudistbað í Týsklandi.



## Dúné heldur ólavsøku

Stóra ólavsøkukonsertin er á gáttuni. Høvuðsnavnið hesaferð er danski rockbólkurin Dúné, sum hevur vunnið fleiri virðislønir í Danmark seinnu árini. Umframt donsku gestirnar fara eisni føroyskir bólkar á pallin – Guðrið Hansdóttir, Bet You Are William, Jens Marni Hansen og Páll Finnur Páll

ÓLAVSØKUKONSERTIN
TÓRSGØTA Í HAVN
TÝSKVØLDIÐ 27/7 KL. 20



Agurkutíð? Sidney Lee býr á 14 fermetrum *Sosialurin*

## Forelskaður sjónleikari í Suðuroy

Páll Finnur Páll munnu verða millum bestu live-bólkar í Føroyum. Teirra lætti og humoristiski poppur hevur rættiliga fingið fatur á ungfólki, og framførslur higartil í summar hava víst, at teir eru betur umtóktir enn nakrantíð áður. Nú kunnu suðuroyingar uppliva Páll Finnur Páll á konsert

PÁLL FINNUR PÁLL
HØLLIN Í TRONGISVÁGI
FRÍGGJAKVØLDIÐ 23/7

Tað var løgið! Streymurin fór í ongum illveðri *Dimma*

## Matur & Matgerð aftur til sølu

Kókibókin Matur & Matgerð er nú endurprentað og verður at fáa í handlunum fyrsta dagin. Tað eru í ár 20 ár liðin, síðani seinasta upplagið kom út, og tað hevur verið útselt í nógv ár. Upprunaliga kom bókin út í 1974. Søgan handan fyrstu útgávuna er tann, at ein ólukkulig genta ringdi til Óluvu Skaale. Gentan skuldi giftast, men visti ikki síni livandi ráð, tí hon dugdi ikki at gera komandi manninum døgverða. Marius Johannsen, verpápi Óluvu, sum var blaðstjóri á Tingakrossi, hugsaði sum so, at um tað var EIN ólukkulig genta, so vóru tær heilt víst fleiri. Tískil endaði tað við, at uppskriftirnar, sum Óluva í mong ár hevði havt ábyrgd av at fáa í Tingakross, blivu savnaðar í eina bók og givnar út. Og so við og við løgdust fleiri uppskriftir afturat, so hvørt, sum endurprentingarnar gjørdust fleiri.

MATUR & MATGERÐ
ENDURÚTGÁVA Í KOMANDI VIKU




Agurkutíð? Matstovur koma og fara *Dimma*




## Teir sterku takast

Í kvøld stórir og sterkir føroyskir menn at kappast í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Føroya sterkasti maður skal finnast, og 9 mans fara at royna at lyfta, toga og halda so nógvari vekt sum gjørligt. Vinnarin í fjør, Heri Vestergaard, er ikki við í kappingini í ár, so Føroyar fáa ein nýggjan sterkasta mann í kvøld

FØROYA STERKASTI MAÐUR
ÍTRÓTTARHØLLIN Á HÁLSI
FRÍGGJAKVØLDIÐ 23/7 KL. 18.30



## Summarhugni í Oyndarfirði

Hetta vikuskiftið fara tey at hugna sær í Oyndarfirði. Leygardagin verða fiskikapping, súkklukapping, spøl og grilling á skránni. Um kvøldið spælir Sámal Ravnsfjall, og fólk fáa eisini høvið at syngja felagssang, áðrenn dansur verður á midnátt.

SUMMARHUGNI Í OYNDARFIRÐI
LEYGARDAGIN 24/7 FRÁ KL. 14.00

Tað má verða líka frætt Oljufeløg rýma úr Meksikoflógvanum *Portalurin*



## Stavn um stavn

Vit eru í avgerandi kappróðrartíðini. Nú skulu seinastu FM-kappingarnar avgerast, og summastaðni er kappingin sera jøvn. Her síggja vit eitt dømi um, hvussu tað kann fara at vera á ólavsøku. Hetta má verða eitt slag av stavn um stav.

## Niðan á Kjølin

Sunnudagin skipar gongubólkur í Havn fyri túri niðan á Kjølin og Myrkjanoyrafjall í Klaksvík. Møtt verður á Kunningarstovuni í Havn, og haðani gongur so leiðin til Klaksvíkar. Fyriskipararnir heita á fólk um at hava heit og góð gongubkløðu við – og ein matpakka.

Gongutúrur
MYRKJANOYRAFJALL OG KJØLUR
SUNNUDAGIN 25/7 KL. 10.00



Síggja fram í tíðina Torkil Veyhe vann næsta umfar *Dimma*

Summar
**Sosialurin** - Postsmoga 76 -110 Tórshavn - Tlf. 341800
Hugskot og viðmerkingar kunnu sendast til: post@sosialurin.fo
**Redaktørur:** Eydna Skaale